

*Signheðin Knudsen hevur virkað sum trúðboðari í Afrika. Hann hevur fingið sær útbúgving í USA og fer í næstum til Singapore og Australia at arbeiða sum trúðboðari. Um vinskap sín við Steve Mutua og kenskap sín til Afrika sigur hann at Afrika hungrar eftir evangeliinum. Hann heldur tað tí vera gott, um føroyskir trúðboðarar fara til Afrika, og her er Steve Mutua ein góður samstarvsfelagi. Her er Signheðin saman við íbúgvum í Kenya*

viks fyri tað at tey svørtu eru fleiri í tali og hava búð har longri.

-Tey hvítu hava so sanniliga búð í hesum landi í mong mong ár og tey hava sín fulla rætt til hetta landið eins væl og tey svørtu. Men sjálvandi skulu tey ikki hava alt valdið. Tað mugu tey býta við tey svørtu sigur hann.

Mutua heldur, at kristindómurin, sum hevur sera sterkar røtur í Suðurafrika, fer at gera sítt til, at ein semja finst.

### Stammukriggini av leivd sum hvørvur

Men eru tey svørtu í heila tikið før fyri at stýra ein um landi sum Suðurafrika, nú vit hoyra so nógv um kríggj millum teir mongu stammurnar spurdu vit Mutua!

-Hatta er eisini nakað, sum mong av tykkum í Vesturheiminum royna at fyrigykla fólki fyri á tann hátt at siga, at tey svørtu eru ikki før fyri at stýra.

Vit hava her við eina leivd frá fortíðini at gera. Tað tekur sína tíð at koma víðari. Her hava leiðararnir í stammunum sera stóran týdning, tí fólkið trýr teimum blint. Nýggja ættarliðið dugir betri at síggja, hvat tænir heildina best og tí haldi eg ikki, at ein skal bera ótta fyri, at tey svørtu í allar ævir fara at stríðast hvør móti øðrum. Hetta hevur eisini nógv við útbúgving at gera.

-Tað nýggja og skúlaða ættarliðið av afrikanarum hugsar øðrvísi. So skjótt tað er sloppið av við teir gomlu og oftani korruptu leiðararnar, fer tað at standa saman um eitt nýtt Afrika.

Mutua sigur, at arbeiðið hjá teimum báðum de Clerk og Mandela er at meta sum at ganga eftir eini útspentari línu. Bert eitt skeivt fet og alt endar í einum ruðuleika. Tí mugu vit vóna, at hesir báðir menn sleppa at arbeiða víðari. Tað vil vera ein vanlukka fyri Suðurafrika, um onkur ger seg inn á annan teirra.

-Tá verður støðan har nógv verri enn hon í dag er í fyrrverandi Jugoslavia.

jan




JAPAN HANDSKAR

ADC

Heilsølan

*Lúarvegur 14 · Tórshavn*

*Tlf 18828 · Fax 18895*


*16 føroyingar á oljuferð í Hetlandi*

# Fara við tyrlu av Boðanesi í morgun

*Skulu millum annað vera gestir hjá oljufeløgunum, sum bora eftir olju kring Hetland*



*Frá eini ferð fyrr við føroyskum vinnulívsfólki í Skotlandi. Mynd: Jan Müller*

Eftir ætlanini skuldi ein bretsk tyrla koma í morgun eftir einum føroyskum ferðalagi, sum næstu fýra dagarnir skal hyggja at hetlendsku oljuvinnuni og hvørja ávirkan hon hevur á samfelagið. Upprunaliga skuldi ferðalagið verið farið av stað mánamorgunin, men tyrlan settist aftur vegna vánaligt veður í Hetlandi.

Við á ferðini vera ikki færri enn fýra borgarstjórar, Jógvan við Keldu úr Klaksvík, Jákup Lamhauge úr Runavík, Páll Vang av Tvøroyri og Bogi Mortensen úr Vági.

Annars vera umboð frá ýmiskum stovnum við. Frá Tryggingarsambandinum kemur Leif Ellingsgaard, frá Verkfrøðingafelagnum, Maria Hansen, frá Kongshavnar Havn, Otto Petersen. Frá landsverkfrøðingsstovninum kemur landsverkfrøðingurin sjálvur og hann eitur Henning Jacobsen og í holinum á honum eisini Signar Heinesen.

Frá Tórshavnar Havn kemur Jónsvein Lamhauge, frá Ídnaðargrunninum Páll Mikkelsen, Johan Ziskason frá Vaktar og Bjargingartænastuni er eisini við og arbeiðsgevararnir senda Arna Poulsen. Samskipari á ferðini er bretski konsulin í Føroyum, Johann Mortensen frá Marr og fyri fjølmiðlarnar eru Jústinus Eidesgaard frá Tíðindablaðnum Sosialurin og Tróndur Djurhuus frá sjónvarpinum.

Ferðalagið skal ferðast kring í Hetlandi og síggja millum annað oljuútbúnaðin á Sullom Voe og ferðalagið skal eisini hitta umboð fyri hetlendsku myndugleikarnar.

Í yvirlitinum yvir ferðalagið stendur eisini hædd din á luttakarnum, hetta eru upplýsingar, sum tyrluskipararnir nýta. Í hesum yvirlitinum verður enn einaferð staðfest, at føroyingar eru ikki stórir menn. Teir longstu á ferðini eru havnameistararnir í Havn og Runavík og teir eita ávikavist Otto Petersen og Jónsvein Lamhauge og eru 188 sentimetar høgir. Undirritaði hoyrir millum teir allarstytstu, 172, tann stytsti er tveir sentimetrar lægri, men hann fara vit ikki at hongja út við navni í blaðnum, tað verður harvið.

Ferðalagið kemur aftur leygarmorgunin við tyrlu.

justinus



*Oljuleitingarskip undir Føroyum*